## Heimsins størsta flogfelag

Fyrrakvøldið bleiv avgjørt at leggja tey bæði stóru amerikonsku flogfeløgini Delta og Northwest saman, og harvið er heimsins størsta flogfelag veruleiki. Bæði feløgini vóru í trongum skóm orsakað av tí dýra brennievninum, samstundis sum hugurin at ferðast er minkaður nógvastaðni. Nýggja felagið skal eita Delta, og stjórin í gamla Delta-felagnum, Richard Anderson, er stjóri. Umleið 80.000 fólk arbeiða hjá tí nýggja felagnum.




## Asii borgarstjóri

Nú er greitt, at tann fyrsti borgarstjórin í teirri nýggju Eystur-Vestur kommununi í Grønlandi verður ein kvinna. Fyrrakvøldið samdust Inuit Ataqatigiit, Demokratarnir og ein býráðslimur úr Ivittuut um at samstarva hetta valskeiðið. Partarnir samdust eisini um, at Asii Chemnitz Narup úr IA verður formaður í nevndini, sum skal fyrireika kommunusamanleggingina og harvið borgarstjóri aftan á samanleggingina tann 1. januar 2009.

# inni útláti



*Ein lemmatrolari brúka millum 5.000 og upp í stívliga 6.000 litar av olju um samdøgnið. Við partroli, kundi hvørt skipið spart einar 2.000 litrar av olju um samdøgnið*




*- Á seinasta túri bunkraðu vit 52.000 litrar av olju fyri umleið 250.000 krónur. Vit fiskaðu í 10 dagar og seldu fyri 350.000 krónur, sigur skipari, sum Sosialuirn hevur tosað við*

stundis, sum summir halda, at partrol kann vera ein gongd leið fyri nøkur av hesum skipum, høvdu aðrir ivaleyst heldur vilja, at skipini fingu nøkur rættindi aðrastaðni, kanska í Grønlandi ella í Barentshavinum.




*Við undirskrivingini er nú endaliga staðfest, at Klaksvíkar kommuna og Svínoyar kommuna fara at leggja saman. Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, fekk sáttmálan suður í løgmálaráðið við sær til góðkenningar*

# Samanlegging staðfest

**Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í løgmálum, fylgdi undirskrivingini í býráðshøllini í Klaksvík í gjár**

STAÐFESTING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Dávur Winther*

Í gjár skrivaðu borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, Steinbjørn O. Jacobsen og borgarstjórin í Svínoyar kommunu, Eyðun Jacobsen, undir sáttmála um samanlegging millum kommunurnar báðar. Undirskrivingin ber í sær, at samanleggingin millum kommunurnar nú endaliga er staðfest.

Nógv fólk var samankomið til undirskrivingina, og millum hesi vóru eisini fleiri fólk, sum hava sín uppruna ella síni ættarbond í Svínoy.

Á skránni við hátíðarløtuna var eitt nú sangur, tónleikur og røður, har bæði borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, borgarstjórin í Svínoyar kommunu og landsstýriskvinnan í løgmálum, Helena Dam á Neystabø, søgdu nøkur orð.

Eftir sjálva undirskrivingina, var ábit og okkurt leskandi, sum Jákup Ziskason stóð fyri.

Tá ið tiltakið í býráðshøllini var liðugt, vísti umboð fyri Klaksvíkar kommunu landsstýriskvinnuni Virkishúsið og Dávavirkið, sum í dag hýsir fleiri tónleikabólkum.

Sagt verður úr Klaksvík, at Helena Dam á Neystabø var sera hugtikin av tí, hon sá.

Eftir vitjanina í Virkishúsinum og Dávavirkinum sessaðust fólk við døgurðaborð á Klaksvíkar Sjómansheimi.




*Á skránni við hátíðarløtuna í býráðshøllini í Klaksvík í gjár var eitt nú sangur, tónleikur og røður vórðu hildnar av borgarstjórunum og landsstýriskvinnu í løgmálum. Eisini var ábit og okkurt leskandi*